Uptakt 4. umfar:

ÁRSINS SPÆLARI VERÐUR KLÁRUR



Hóast Adrian Justinussen breyt nøsina sunnudagin, so ætlar hann at spæla grannauppgerðina móti B36. Fjórða umfar bjóðar upp tvær uppgerðir í topp-fimm, og tvær uppgerðir í botn-fimm

TRÓNDUR ARGE

Tað verður fult umfar í landskappingini um vikuskiftið. Fyrsti dysturin verður leygarkvøldið, tá grannauppgerð verður við Løkin. NSÍ fær vitjan av Víkingi, sum er uttan landsliðsliðskiparan. Atli Gregersen fekk beinleiðis reytt kort í dystinum móti HB og verður ikki við.

Sunnudagin verður grannauppgerð í Gundadali millum B36 og HB. Árstalsfelagið hevur fult stigatal eftir trý umfør, meðan HB vann sín fyrsta sigur sunnudagin.

TB hevur longu prógvað, at liðið er til reiðar at bjóða av. Nú koma stigaleysir sundalagsmenn á vitjan. Hetta kann blíva ein avgerandi dystur, tí vinnur heimaliðið, so er longu langt á mál hjá EB/Streymi. Á Argjum er uppgerð millum AB og Skála. Gestirnir vunnu í farna umfari á NSÍ, og tað hevur sett Skála á føroyska fótbóltskortið í løtuni.

Fimti og seinasti dysturin er millum ÍF og KÍ. Fuglfirðingar fingu sítt fyrsta stig í farna umfari.

NSÍ-Víkingur (Beinleiðis á FM1)

Leygardagin klokkan: 19:00

DÓMARI: EILER RASMUSSEN

Bæði NSÍ og Víkingur slikka sárini, eftir at hava tapt í farna umfari. NSÍ tapti eitt sindur óvæntað 2-0 á Skála. Sermerkt við ósigrinum var, at Skála vann ruddiliga uppiborið, meðan eyðkenda NSÍ-spælið ikki var at siggja.

Ein orsøk er at Skála tykist væl sterkari í ár, men ein onnur orsøk er, at Petur Knudsen er skaddur. Hann hevur verið ein týðandi spælari í fyrstu dystunum. Hann var besti maðurin á vøllinum móti HB í 2. umfari, men bleiv so illa viðfarin, at hann situr uttanfyri við skaða í økslini.

Tað er ikki bara í Runavík, at lyklaspælarar sita uttanfyri. Víkingur er uttan Atla Gregersen, sum fekk beinleiðis reytt kort í dystinum móti HB sunnudagin. Víkingur tapti 3-1. Eisini her er sermerkt hvussu greiður ósigurin var. HB var væl omaná.

Bæði liðini hava fýra stig í part og tað er á eini leið, men ein ósigur her kemur illa við. NSÍ er á heimavølli, men spælið hevur verið undir miðal. Víkingur er í framgongd, men sunnudagurin vísti at tað er langt á mál.

Hetta luktar av einum javnleiki.

SOSIALURIN TIPPAR 1-1

B36-HB (Beinleiðis á FM1)

Sunnudagin klokkan 15:00

DÓMARI: ALEX TROLEIS

Sunnudagin breyt Adrian Justinussen nøsina í dysti móti Víkingi. Hann segði eftir dystin við ÍtróttarSosialin, at hann ætlaði at spæla móti B36. Nú er nøsin ikki hovin meir og úr HB verður sagt, at ársins spælari 2018 verður tøkur til dystin móti B36.

HB var sannførandi í sigrinum á Víkingi. Spælið gekk skjótari og tað hjálpti væl, at Símun Samuelsen aftur spældi frá byrjan. Eisini kemur tað væl við, at tveir teir fremstu, Ari Mohr Olsen og Dan í Soylu, fingu mál.

Í B36 er skaðalistin framvegis langur, men higartil hevur tað ikki gjørt mun. B36 er einasta liðið við fullu stigatali eftir trý umfør. Tó var sigurin á Argjum eitt sindur heppin, tí seinna málið er hvørtfall rangstøða.

Stóri spurningurin hjá B36 verður um Brian Jakobsen og Lukasz Cieslewicz verða tøkir at spæla. Serliga Lukasz Cieslewicz hevur stóran týdning í spælinum, men hevur ikki verið fult tøkur at spæla síðani B36 spældi móti Besiktas í Europa League í fjør. Brian Jakobsen er í løtuni einasti beinleiðis áleyparin í hópinum.

Grannauppgerðirnar millum B36 og HB enda næstan altíð við javnleiki. Í fjør endaðu tríggir av fýra dystum við javnleiki. Einasta útfallið kom í 26. umfari, tá HB vann 3-1 á B36.

SOSIALURIN TIPPAR 2-2

TB-EB/Streymur

Sunnudagin klokkan: 15:00

DÓMARI: RÚNI GAARDBO

Við sigri á AB í fyrsta umfari og javnleiki móti ÍF sunnudagin, hevur TB vunnið sær fýra stig í trimum teimum fyrstu umførunum. Tað er ikki so galið, tá hugsað verður um allar tær broytingarnar, sum hava verið.

Hesa ferð verður Veljko Vukovic ikki við. Hann hevur meiðslað sær knæið. Hópurin hjá TB hevur avbjóðingar tá tað kemur til breiddina. Nú kemur fyrsta avbjóðingin.

Gestirnir eru EB/Streymur, sum higartil einki stig fingið. Tað er heldur ikki so óvæntað, tí mótstøðuliðini hava verið B36, NSÍ og KÍ. Men er tað støðan aftaná teir komandi dystirnir, so verður verri. EB/Streymur skal spæla móti TB, AB, Skála og ÍF.

Higartil hevur EB/Streymur bara fingið tvey mál, meðan TB hevur skorað fýra. Her er tó vert at hava í huga, at TB hevur fingið málini móti AB og ÍF, meðan EB/Streymur hevur fingið síni mál móti B36 og KÍ.

Hetta er ein torførur dystur at meta um, tí vit hava ikki sæð EB/Streym í dysti móti einum av teimum í botn-fimm. Tí kann hesin dystin siga okkum nógv. Hartil hevur EB/Streymur ikki vunnið ein dyst síðani 17. juni í fjør.

SOSIALURIN TIPPAR 1-1

ÍF-KÍ

Sunnudagin klokkan: 15:00

DÓMARI: LARS MULLER

ÍF hevur fingið sítt fyrsta stig við javnleikinum móti TB, meðan KÍ hevur fingið eina góðkenda byrjan upp á kappingarárið við fimm stigum í trimum umførum. Onkur hevur hildið fyri, at hetta er ein dystur millum KÍ a og KÍ b. Hóast hetta bara er skemt, so er tað ein sannleiki í at fleiri spælarar hjá ÍF hava sín uppvøkstur í KÍ. Poul N. Mikkelsen, Gunnar Christiansen, Dávid Langgaard

LIÐ TÍÐINDI

AB

Ikki við: Bjarki Nielsen (leikbann, 2 gul), Jákup Pauli Breckmann (lærkrikin 1-2 vikur), Jógvan Jóannesarsson (knæið, 3-4 vikur), Hans Jákup Annfinsson (burturstaddur)

B36

Ikki við: Rói Mørk Hentze (knæskaði, 4 vikur), Símun Rógvi Hansen (langtíðarskaddur), Hannes Agnarsson (lærskaði, 4-6 vikur), Magnus Holm Jacobsen (lærkriki, 1-3 vikur), Róaldur Jakobsen (langtíðarskaddur), Hugin Samuelsen (knæskaði, 1-3 vikur), Michal Przybylski (knæskaði, 2-4 vikur), Erlendur Magnusson (langtíðarskaddur)
Ivasamir: Brian Jakobsen (høvdið), Lukasz Cieslewicz (knæskaði)

EB/STREYMUR

Ikki við: Andras Olsen (krossbandið, úti fyri árið), Jóhannes Hansen (krossbandið, mánaðir), Arnar Dam (knæið, úti í vikur), Leif Niclasen (fóturin, óvist), Niklas Kruse (fipur, 2-6 vikur)
Ivasamir: Arnbjørn Hansen og Steffan Løkin

HB

Ikki við: Sebastian Pingel (knæið, 1-2 vikur), Tróndur Jensen (lærið, óvist)

ÍF

Ikki við: Dánjal á Lakjuni (lærkrikin, 2-4 vikur), Tóri Traðará (knæið, óvist)